## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:** Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Um kvøldið veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av norði og regn. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið mikudagin:** Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av norði og regn, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 18 og 21 stig.




**Veðrið hósdagin:** Fleyr til gul av norði, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 18 og 21 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:** Fríggjadagin fleyr til gul av ymsum ættum, ella av norði, leygardagin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 16 stig.

Petur Skeel Jacobsen:

# - Vit hava brúk fyri einari ódn



*- Lágtrýstini koma frá New Foundlandi og hendavegin. Um ein ódn hevði lagt seg vestan fyri Írland, so hevði tað givið okkum eina eysturætt, og harvið høvdu lágtýstini ikki sloppið framat Føroyum. So hevði gott veður verið í umbúna í Føroyum, sigur Petur Skeel, veðurfrøðingur á Sosialinum*
*Mynd: Bárður*

- Eg veit ikki, um fólk minnast ódnina Alex í fjør. Hon kom inn í Atlantshavið og legði seg vestan fyri Írland. Tað gjørdi, at hon sperraði av fyri lágtrýstunum, og tá fingu vit fínasta veður í Føroyum í fleiri vikur, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur.

- Nú fara allar ódnirnar inn í Meksikoflógvan, og tær koma ikki víðari út í Atlantshavið. Men ódnin Alex kom fram við strondini, út í Atlantshavgið, og legði seg vestan fyri Írland, har hon blokeraði lágtrýstunum. Tað gjørdi, at eitt hátrýst bygdi seg upp á okkara leiðum og gav okkum gott veður, sigur Petur Skeel.

- Tískil hava vit brúk fyri einari ódn, sigur Petur Skeel.

Onki røkist tó fyri, at vit fáa nakra ódn fyribils. Streymurin í lufthavinum er háttaður soleiðis í løtuni, at allar ódnirnar fara inn í Meksikoflógvan.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 21 |
| London | 26 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 27 |
| Madrid | -- |
| Róm | 30 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 31 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 40 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 15 |
| New York | 25 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 11 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 989 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Føroyar fer eystureftir og brúgvalagið haðani til havíð eystan fyri Føroyar kemur hendavegin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/7 kl. 06⁰⁰– 18/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,4°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 9,4 mm – mált frá 17/7 kl. 06⁰⁰– 18/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 43,3 mm

**Vika 28 – 16. juli**
Vinnaratøl: **05 - 11 - 20 - 22 - 25 - 31 - 33**

Eykatøl: **10 - 28**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **3.615.295,- kr.** |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | **60.294,- kr.** |
| 6 vinnaratøl | **3.845,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **155,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **44,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Vika 28 – 16. juli**
Jokaratal: **5 - 8 - 5 - 6 - 5 - 5 - 7**

| | |
|---|---|
| Øll 7 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 6 aftastu røtt: | **343.798,- kr.** |
| 5 aftastu røtt: | **20.251,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **2.337,- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **237,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **49,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 13 úrslit
**Vika 28 – 16. juli**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Dep. La Coruna - Slav. Belupo | 1 |
| 2. | Dortmund - Sigma Olomouc | x |
| 3. | FK Dubnica - Newcastle | 2 |
| 4. | Gent - Valencia | x |
| 5. | IFK Göteborg - Wolfsburg | 2 |
| 6. | Lazio - Tampere U | 1 |
| 7. | Roda - Slovan Liberec | x |
| 8. | Un. Leiria - Hamburger SV | 2 |
| 9. | Varteks - Lens | x |
| 10. | Young Boys - Marseille | 2 |
| 11. | Hammarby - Landskrona | 1 |
| 12. | Helsingborg - Örgryte | 1 |
| 13. | Malmö FF - Halmstad | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **5.200,- kr.** |
| 12 røtt: | **149,- kr.** |
| 11 røtt: | **18,- kr.** |
| 10 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli Fyrra kvarter
21. juli Fullmáni/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. Juli | 05.14 | 17.42 | 04.14 | 16.42 | 04.29 | 16.57 | 07.14 | 19.42 | 08.14 | 20.42 | 03.29 | 15.57 | 02.29 | 14.57 | 05.29 | 17.57 | 06.29 | 18.57 | 04.59 | 17.27 | 06.14 | 18.42 |
| 20. Juli | 06.10 | 18.40 | 05.10 | 17.40 | 05.25 | 17.55 | 08.10 | 20.40 | 09.10 | 21.40 | 04.25 | 16.55 | 03.25 | 15.55 | 06.25 | 18.55 | 07.25 | 19.55 | 05.55 | 18.25 | 07.10 | 19.40 |
| 21. Juli | 07.10 | 19.41 | 06.10 | 18.41 | 06.25 | 18.56 | 09.10 | 21.41 | 10.10 | 22.41 | 05.25 | 17.56 | 04.25 | 16.56 | 07.25 | 19.56 | 08.25 | 20.56 | 06.55 | 19.26 | 08.10 | 20.41 |
| 22. Juli | 08.12 | 20.40 | 07.12 | 19.40 | 07.27 | 19.55 | 10.12 | 22.40 | 11.12 | 23.40 | 06.27 | 18.55 | 05.27 | 17.55 | 08.27 | 20.55 | 09.27 | 21.55 | 07.57 | 20.25 | 09.12 | 21.40 |
| 23. Juli | 09.09 | 21.35 | 08.09 | 20.35 | 08.24 | 20.50 | 11.09 | 23.35 | - | 12.09 | 07.24 | 19.50 | 06.24 | 18.50 | 09.24 | 21.50 | 10.24 | 22.50 | 08.54 | 21.20 | 10.09 | 22.35 |

5 707265 100029 >